# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Løgmaður á fótbóltslandsliðið

**Tað er tó ikki Brian Kerr, sum hevur sent løgmanni dystarboð, men Jens Martin Knudsen, sum saman við Una Arge stendur á odda fyri úttøkuni av føroyskum veteranlandsliði**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eru fyrrverandi íslendskir landsliðsspælarar, sum hava tikið stig til dystin, verður á Tórsvølli nú leygardagin.

Í tíindaskrivinum verður sagt, at hetta er ein eitt dømi um sterku vinarbondini, sum altíð hava verið millum Føroyar og Ísland. Og at íslendsku spælararnir á hendan hátt vilja sýna sína tøkk mótvegis hjálpini, sum Føroyar hava veitt grannatjóð okkara, nú landið er í svárari búskaparkreppu. Og í so máta er helst mikið hóskandi, at løgmaður er millum spælararnar á føroyska liðnum.

Uni Arge og Jens Martin Knudsen hava báðir roynt seg í íslendskum fótbólti, og teir bóru skjótt av, tá teir fingu áheitan um dystin.

Kostnaðurin fyri at koma inn á Tórsvøll leygardagin er settur til 20 krónur, og fer ágóðin av dystinum óskerdur til vælgerandi endamál á Landssjúkrahúsinum. Hetta eftir áheitan frá íslendsku spælarunum.

Sjálvur dysturin verður spældur leygardagin klokkan 16, og verður tað varaforsetin í FSF og fyrrverandi altjóða dómarin, Niklas á Líðarenda, sum skal døma dystin.



## Føroyski hópurin

Jens Martin Knudsen, Leiftur
Kaj Leo Johannesen, HB
Hans Fróði Hansen, Fram, Breiðablik
Jens Christian Hansen B36, Ayr United
Uni Arge, Leiftur, IA
Sámal Joensen, Leiftur
Jens Erik Rasmussen, Leiftur
John Petersen, Leiftur
Alan Mørkøre, IBV
Allan Joensen, Skallagrimur
Pól Tortsteinsson, Valur
Gunnar Mohr, HB
Øssur Hansen, B68, B36
Jákup Eli Olsen, B68
Kári Reynheim, HB, B36
Magni Jarnskor, GÍ
Bjarki Mohr, B71, HB
Jákup S. Simonsen, B36



*Kaj Leo Johannesen var í fleiri ár millum fremstu føroysku fótbóltsspælararnar. Hann verður partur av føroyska hópinum, sum leygardagin skal spæla veteranlandsdyst móti Íslandi*

# So vann Shearer

**Newcastle kom í gjárkvøldið upp um niðurflytingarstrikuna við sigri á Middlesbrough**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Alan Shearer hevur bíðað fleiri vikur eftir sínum fyrsta sigri, sum venjari hjá Newcastle.

Í gjárkvøldið kom hesin til høldar, tá Newcastle vann granna- og botnuppgerðina ímóti Middlesbrough 3-1.

Støðan í hálvleikinum var javnleikur 1-1. Tað byrjaði annars stak illa hjá Newcastle. Longu tá tríggjir minuttir vóru farnir kom Middlesbrough á odda við einum sjálvmáli. Tó gingu bert seks minuttir, so hevði Newcastle javnað, tá Steven Taylor stútaði eitt hornaspark frá Danny Guthrie í netið.

Leingi sá út til, at dysturin fór at enda við javnleiki, sum hvørki liðið í roynd og veru kundi brúka til nakað sum helst.

Men tá 70 minuttir vóru farnir satsaði Alan Shearer. Hann tók Michael Owen út, og setti Obefemi Martins á vøllin. Martins hevði verið á vøllinum eina stutta løtu, tá hann langaði bóltin framvið Brad Jones í Middlesbrough-málinum til 2-1. Stutt undan leikloki staðfesti danin, Peter Løvenkrands sigurin hjá Newcastle, sum nú er at finna røttu megin niðurflytingarstrikuna.

# Mistøkini hjá Øvrebø skulu hevnast

**Chelsea-fjepparar eru farnir undir eina herferð, sum skal minka um møguleikarnar hjá Noregi at vinna Tónleika Grand Prix komandi vikuskiftið**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Norski fótbóltsdómarin, Tom Henning Øvrebø hevði kanska sín ringasta dag, sum fótbóltsdómari, tá hann dømdi seinnu hálvfinaluna millum Chelsea og Barcelona á Stamford Bridge seinasta mikukvøld.

Tom Henning Øvrebø vildi ikki døma brotsspark, hóast fleiri støður vóru, sum kundu - og kanska burdu - givið Chelsea brotsspark. Hetta hevur fingið ilt í fleiri Chelsea-fjepparar, og nú skal vreiðin hjá teimum ganga út yvir norska luttakaran í tí europeisku tónleikakappingini Eurovision. Chelsea-fjepparnir heita nú á Bretland og onnur lond, um at syrgja fyri, at Alexander Rybak, sum umboðar Noreg ikki fær nakað stig í europeisku tónleikakappingini.

### Tekur tað ikki í álvara

Alexander Rybak er annars favorittur til at vinna Grand Prix-kappingina hjá fleiri veddingarfyritøkum. Men nú arbeiða Chelsea-fjepparar hart fyri, at Noreg og Alexander Rybak ikki fáa sigurin í europeisku tónleikakappingini til høldar. Leiðarin fyri Chelsea-stuðlunum í Noregi, Even Strete sigur í stuttari viðmerking til Rás2, at talan má vera um skemt, sum hann ikki dugir at taka í fullum álvara.

- Grand Prix kappingin hevur lítlan og ongan týdning, væl minni av týdningi enn fótbóltur hevur, heldur Even Strete. Even Strete sigur, at tey í Chelsea-fjepparafelagnum í Norgi eru misnøgd við avrikið hjá Tom Henning Øvrebø á Stamford Bridge seinasta mikukvøld, men at tey taka frástøðu frá persónsjagstran ímóti Tom Henning Øvrebø.